Kommunufelagið

## Tann góða tilgongdin – vegleiðing til starvsfólk á dagstovni og í dagrøkt

Í sambandi við at Tann góða tilgongdin er farin at virka, er tað staðfest, at kommunalu dagstovnarnir hava skyldu til at tryggja, at børn verða víst til greiningar, tá ábending er um autismu.

Tað er tí neyðugt, at starvsfólk á dagstovnum og í dagrøktum kenna til tey fyrstu teknini, sum kunnu geva ábending um, at eitt barn hevur autismu.

Tað er ikki uppgávan hjá hesum starvsfólkum at staðfesta, *um* eitt barn hevur autismu ella ikki.  Men tað er umráðandi, at starvsfólkini kenna so mikið  til autismu, at tey saman við foreldrunum eru før fyri at varnast, tá ábendingar eru, sum eru neyðugar at taka í álvara og fylgja upp.

Um starvsfólk meta, at talan kann vera um, at eitt barn møguliga hevur autismu, skulu tey í samráð við foreldrini vísa barnið til Sernám.

Nógvar orsøkir kunnu vera til at stúra um menningina hjá børnum. Tí er tað umráðandi at kanna øll viðurskifti hjá barninum væl, so barnið fær røttu hjálpina.

Áðrenn eitt barn verður víst til nærri greining hjá Sernámi, skal tað tí eisini kannast hjá kommunulækna fyri at staðfesta, at tað ikki eru likamligar orsøkir til, at barnið vísir ávís eyðkenni.

Tað er ofta torført at meta um, nær ábending er um autismu.
Børn við autismu hava vanliga ikki sjónlig brek og eru líka ymisk, sum øll onnur børn.

Har eru tó sum meginregla nøkur felags eyðkenni:

Menningin hjá einum barni við autismu er ofta merkt av truplum samskifti, málsligum órógvi, ritualum ella serstøkum áhugamálum.

Ábending um autismu vísir seg serliga, um barnið hevur frávik á hesum økjum:

- Ímyndingarevnum
- Samskifti
- Sosialum samspæli við onnur menniskju

Eisini kann barnið vera serliga sensitivt í mun til sansaávirkan, eitt nú ljóð, ljós ella lukt.

Børn, sum fáa staðfest autismu megna ofta illa at vera saman við øðrum børnum á ein vanligan hátt. Tey skilja illa hini, hugsa øðrvísi og hava ein øðrvísi atburð. Tey gerast tí ikki ein sjálvsagdur partur í samveruni við onnur børn.

Um tú vilt vita meir, sí t.d.: www.centerforautisme.dk ella www.autisma.fo

Havið tó eisini í huga, at har kunnu vera nógvar aðrar orsøkir til, at eitt barn vísur hesi eyðkenni. Tað er sostatt ikki víst, at talan er um autismu, hóast fleiri av áður nevndu teknum eru til staðar.

Eru starvsfólk í iva, um talan kann vera um autismu, ber til at at ráðføra seg við kommunalu námsfrøðiligu ráðgevingareindirnar, har slíkar eru. Har eingin kommunal ráðgeving er, ber til hjá kommununi at keypa hesa tænastu frá Klaksvíkar, Runavíkar ella Tórshavnar kommunu.

Ráðgevin kann m.a. hjálpa við at kanna, um aðrir faktorar kunnu hava ávirkan á støðuna og atburðinum hjá barninum. Um neyðugt, kann ráðgevin eisini vegleiða í mun til tilmeldingina til Sernám.

Leinki til tilmeldingarskjalið hjá Sernámi: Tilmelding til Sernám

Um tørvur er á at keypa tænastur frá námsfrøðiligum ráðgeva, ber til at venda sær til Kommunufelagið, Sveiney Sverrisdóttir á telefon 59 07 60 ella t-posti: sveiney@kf.fo

Kostnaður fyri hesa tænastu er samb. avtalu millum KF og KAF. Talan verður um tímatakst á kr. 284,00 og heraftrat ferðaútreiðslur við løn undir ferðing.